**Fra:** Rani Reginsson Johansen
**Sendt:** týsdagur, 24. november 2020 14:44
**Til:** 'Listafólkasamband Føroya' <lisa@lisa.fo>
**Emne:** SV: Hagtøl fyri hjálparpakkan til listina

Hey aftur,

Niðanfyri eru upplýsingar, ið LISA hevur biðið um viðv. stuðul eftir hjálparpakka 3, t.e. sambært løgtingslóg nr. 103 av 25. juni 2020 um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19.

## Listafólk

TAKS hevur fingið 21 umsóknir um stuðul til listafólk.

Av 21 eru 7 vrakaðar av ymsum orsøkum meðan 14 eru viðgjørdar. Av 14 hava 7 fingið útgjald úr hjálparpakka 3 meðan 7 einki hava fingið vegna mótrokning.

**Søkt var (vrakaðar umsóknir taldar uppí) um samlað kr. 2.813.604,70. Játtað var samlað kr. 469.278,53.**

Orsøkir til at vraka umsóknir eru fleiri, harundir tí at umsøkjarar:

- ikki lýka treytina í § 2, stk. 1 í løgtingslógini, t.e. um hvussu "listafólk" er definerað,
- ikki kundu staðfesta teirra fíggjarliga tap,
- høvdu bústað uttanlands,
- vóru løgfrøðiligar persónar og ikki likamligar, og
- ikki lótu inn umbiðin skjøl

Orsøkir til ikki at veita upphæddir, sum vórðu søktar um, vóru serliga at:

- upphæddin, ið søkt varð um, var hægri enn hámarkið á kr. 110.000, sbrt. § 2, stk. 2 í løgtingslógini, og
- mótroknað bleiv sambært § 2, stk. 4 í løgtingslógini, tí umsøkjari fekk stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan.

Verða ov høgar upphæddir, ið søkt er um, minkaðar niður til kr. 110.000, ið er hámarkið fyri stuðul í løgtingslógini, kann sigast at søkt var um samlað kr. 1.306.058,70. Umsóknir, ið ikki vórðu vrakaðar, telja fyri kr. 978.883,60 av hesum.

## Tónleikafestivalar

TAKS hevur fingið 4 umsóknir um stuðul til tónleikafestivalar.

Ongar umsóknir eru vrakaðar. Av 4 hava 3 fingið útgjald úr hjálparpakka 3 meðan 1 einki hevur fingið.

**Søkt var um samlað kr. 2.956.993,80. Játtað var samlað kr. 1.936.837,77.**

## Almannagagnlig tiltøk

TAKS hevur fingið 17 umsóknir um stuðul til almannagagnlig tiltøk.

Av 17 eru 7 vrakaðar av ymsum orsøkum meðan 10 eru viðgjørdar og hava fingið stuðul.

Orsøkir til at vraka umsóknir eru fleiri, harundir at:

- umsøkjarar hava bústað uttanlands,
- metta inntøkan hevur verið ov lítil, sbrt. § 5, stk. 5 í løgtingslógini,

- talan ikki hevur verið um almannagagnligan felagsskap,
- talan ikki hevur verið um almannagagnlig tiltøk, og
- skjalprógv manglar.

**Søkt var (vrakaðar umsóknir taldar uppí) um samlað kr. 2.715.924,20. Játtað var samlað kr. 1.526.776,45.**

### Hølisútleigan

TAKS hevur fingið 4 umsóknir um stuðul fyri mistar leiguinntøkur hjá áhugafeløgum og almannagagnligum felagsskapum.

Ongar umsóknir eru vrakaðar og allir umsøkjarar hava fingið stuðul.

**Søkt var um samlað kr. 311.210. Játtað var samlað kr. 303.000.**

Vónandi er hetta nøktandi svar. Hevur LISA fleiri spurningar, kann LISA venda sær til mín á rani@taks.fo.

Vinarliga

Rani R. Johansen
fulltrúi

Lógardeildin
Tel. 792741

TAKS

Postrúm 2151, FO-110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel 35 26 00

**Fyrivarni**

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.